# Meira fólksligt

**Tú mást halda teg til tað gerandisliga, heldur enn tað floykta í vallyftunum. Flokkurin er vorðin alt ov akademiskur í sínum boðskapi, segði Sjúrður Skaale á Flokstingi Tjóðveldisfloksins**

FLOKSTING
*Heri á Rógvi*



*Sjúrður Skaale helt, at Tjóðveldisflokkurin var alt ov akademiskur í sínum boðskapi. Ráðini eru at gera tað meira fólksligt, heldur hann.*

*Mynd: Heri á Rógvi.*

Ein hin mest sjálvrannsakandi á Flokstingi Tjóðveldisfloksins var Sjúrður Skaale. Hann starvast til dagligt hjá Norðuratlantsbólkinum, umframt at hann hevur markerað seg millum annað við at stilla upp til fólkatingsval.

Hansara boðskapur til sínar partamenn og kvinnur var, at politikkurin var alt ov akademiskur, og tað var alt ov torskilt hjá fólki at seta seg inn í boðskapir sum eitt nú fólkarættarligt subjekt.

– Orsøkin til, at Tjóðveldisflokkurin fekk eina risa framgongd á løgtingsvalinum í 1998 var, at politikkurin hjá flokkinum fekk eitt innihald. Áðrenn var boðskapurin loysing og einki meira. Men við kenda sjónvarpsmanninum við trúvirði, fekk politikkurin eitt innihald, og tað snúði seg ikki longur bara um loysing – men hvussu loysing varð skipað, sigur Sjúrður Skaale.

Og hetta sama innihald vantar nú, og er orsøkin til, at flokkurin ikki hevur merkt størri framgongd, heldur Sjúrður Skaale.

–Tjóðveldisflokkurin byggir serliga sítt valstríð á floykt hugsjónarlig og akademisk mál. Nógv tey flestu skilja als ikki hetta. Fólk hava áhuga fyri tí gerandisliga – hvussu teirra lív ávirkast og kann gerast betri, sigur Sjúrður Skaale.

## Klókur flokkur

Tað er kanska heldur ikki so undarligt, at Tjóðveldisflokkurin er so akademiskur í verumáta. Tí sambært Sjúrði Skaale eru tað eisini tey klókastu – tey best lærdu og stinnastu lesararnir, ið velja Tjóðveldisflokkin.

– Ein vanligur veljari hjá Tjóðveldisflokkinum lesir nógv og fylgir væl við, men ein sambandsveljari lesur vanliga SMS blaðið, sigur Sjúrður Skaale.

Og tað er eisini her, at vit finna sjálva kjarnina í trupulleikanum. Boðskapurin hjá flokkinum fer yvir høvdið á fólki, sum kanska vanliga bara lesa SMS blaðið. Verandi veljarar eru tey hugsjónarligu akademisku fólkini, men skulu fleiri fáast, má boðskapurin gerast meira gerandisligur til øll. Tað sentrala skal vera tað einkulta menniskja, metir Sjúrður.

– Tað nyttar einki at tosa um fólkarættarligt subjekt ella at senda stevnuskráir til fólk, sum ikki tíma ella hava tí at lesa tað. Fólk hava áhuga fyri, hvussu teirra lív verður betri, og tey ynskja ikki nakra kollveltandi broyting, sigur Sjúrður Skaale.

## Eingin skilur Listbeth

Av somu orsøk sum omanfyri halda nógv fólk seg aftur við at velja Tjóðveldisflokkin, heldur Sjúrður Skaale.

– Tjóðveldisflokkurin hevur staðið fyri teirri ótryggu loysnini - tann ókendi møguleikin, sigur Sjúrður Skaale.

Henda trygga loysnin hevur Lisbeh L. Petersen og Sambandsflokkurin staðið fyri, sambært Sjúrða Skaale. Hetta er orsøkin til, at Sambandsflokkurin fekk fótað sær so mikið væl við seinasta val.

– Eingin, sum fæst við samfelagsviðurskifti skilur heilt, hví føroya fólk góvu Lisbeth L. Petersen flestar atkvøður.

Svarið má vera, at hon stendur fyri tað verandi og tað trygga, sigur Sjúrður Skaale, sum sjálvur er stjórnmálafrøðingur.

Sum eina fyrimynd nevndi Sjúrður Skaale bretska Labour flokkin. Hann varð umskipaður við navninum New Labour, har flokkurin segði seg vilja gera eitt sáttmála við fólk um viðurskifti, sum vóru viðkomandi fyri tann einstaka.

Tað háfloykta hugsjónarliga varð lagt afturum, og boðskapurin gjørdist meira fólksligur. Og hesum tóku fólk undir við, og flokkurin hevur í dag stjórnarvaldið í Bretlandi.

– Vit skulu venda tingunum við. Tað eru vit, ið eru tað trygga verandi loysnin. Vit hava stýrt landinum við góðu úrsliti - og ikki andstøðan, segði Sjúrður Skaale á Flokstingi í Hósvík.

# Hetta árið er avgerandi

**Formaðurin í Búskaparráðnum heldur hetta komandi árið vera tað mest avgerandi búskaparliga síðani 1975**

FLOKSTING
*Heri á Rógvi*



*Mynd: Heri á Rógvi*

Búskaparliga kunnu Føroyar nærkast vandaleið innan leingi. Hetta árið verður tað mest avgerandi árið síðani 1975.

Hetta metir Hermann Oskarsson, búskaparfrøðingur og formaður í Búskaparráðnum.

Hann var gestarøðari á Flokstingi Tjóðveldisfloksins í Hósvík um vikuskiftið.

Hann tosaði nógv um stevnumið móti dagligum politiskum málum. Her helt hann, at Tjóðveldisflokkurin hevði ein trupulleika, tí flokkurin hvønn dag arbeiðir við blokkinum, sum teir eru ímóti, og hesum var Høgni Hoydal samdur við honum í.

Men Hermann Oskarsson tosaði mest um heildarveitingina, blokkin.

– At reka eitt samfelag við og uttan blokk er fullkomiliga hvør sítt. Tað heila fellur upp á pláss upp á hvør sína máta við ella uttan ríkisveiting. Og sannleikin er tann, at tað verður munandi truplari at loysa trupulleikarnar eftir loysingina, sigur Hermann Oskarsson.

## Avgerandi

Sambært Hermann Oskarsson hevur gongdin við ríkistuðulinum verið tann, at vit í Føroyum frá 1962 til 1975 nýttu brúktu alla veitingina til at keypa fyri – hvørki meira ella minni.

Frá 1975 til 1993 broytist gongdin, og føroyingar fara at nýta tað dupulta av blokkinum. Men aftur frá 1993 til í dag hava vit bert nýtt 10%.

– Samanlagt merkir hetta, at vit hava nýtt so at siga alla veitingina – hvørki meira ella minni, sigur Hermann Oskarsson.

Og hóast tað er at fegnast um, at tað gongur so mikið væl í búskapinum í løtuni, og føroyingar nú eiga 2-3 mia. meira, enn teir skylda, er tað altíð soleiðis, at ein heppin støða er fráboðan um nakað annað.

– Vit vita, at fólk fara at krevja meira og meira, og tí fer verandi støða ikki at halda fram. Spurningurin er ikki, um tað kemur hol á bløruna, men hvussu, sigur Hermann Oskarsson.

Formaðurin í Búskaparráðnum heldur, at gongdin vísir, at vit eru komandi til eitt vegamót, og hetta árið verður avgerandi fyri hvønn veg føroyski búskapurin skal fara – skal blokkurin javnvigast.

– Tað, eg ræðist, er, at búskaparligu tillagingarnar henda, áðrenn fullveldi, tí so samsvarar ikki, sigur Hermann Oskarsson.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



## Olaf í Garði Joensen á ting

Týsdagin 1. apríl tók Olaf í Garði Joensen sætið á løgtingi fyri Tórbjørn Jacobsen, sum er í farloyvi. Næsti á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Eysturoynni, Hallbjørg Hansen, boðaði frá at henni bar ikki til at møta, og bað hon um, at næstvaldi eftir hana tók sæti í tingi. Tað var Olaf í Garði Joensen á Eiði. Olaf er føddur og uppvaksin á Eiði, hann lærdi til maskinsmið á Tórshavnar Skipasmiðju frá 1977-81, síðan gekk hann á maskinskúla. Frá 1983-85 sigldi hann við skipum hjá Strandferðsluni. Seinastu 14 árini hevur hann arbeitt sum maskinmaður hjá SEV. Til seinasta løgtingsval fekk hann 157 persónligar avkvøður í Eysturoynni. Tjóveldisflokkurin fekk 141 atkvøður á Eiði, sum er søguligt met. Olaf er giftur við Eddu, f. í Geil, úr Skálvík, og eiga tey tvær døtur.



## Finnleif Guttesen á ting

Finnleif Guttesen hevur tikið sætið á løgtingi fyri Johan Dahl, sum er í farloyvi. Finnleif er næstvaldi á listanum hjá Sambandsflokkinum í Suðuroy. Finnleif er føddur og uppvaksin í Vestmanna. Hann bleiv útbúgvin maskinmeistari í 1972 og sigldi í danska handilsflotanum í 15 ár. Í 1976 búsettist hann á Tvøroyri. Eftir at hann hevði siglt sum maskinmaður við trolara úr Suðuroynni í tvey ár, fekk hann í 1988 starv sum maskinmeistari á SEV verkinum í Vági. Síðan januar 2001 hevur Finnleif verið í farloyvi frá sínum starvi hjá SEV. Hann var borgarstjóri á Tvøroyri frá 1. januar 2001 til 1. Februar 2003. Finnleif er giftur við Sólrun, f. Olsen, av Tvøroyri, og tey eiga tey ein son og eina dóttir.

## Flóvin Tyril 60 ár



Mánadagin 7. apríl fylti Flóvin Tyril í Norðragøtu 60 ár. Flóvin er føddur og uppvaksin í Norðragøtu. Hann lærdi til rørsmið hjá pápanum, Jákup Zachariasen, og arbeiddi sum sjálvstøðugur rørleggjari í nøkur ár. Flóvin er ein framúr góður handverkari. Seinnu helvt av 70-unum kom Flóvin at arbeiða sum setari á forlagnum og prentsmiðjuni Røddini á Skála. Í 1983 flutti forlagið og prentsmiðjan til Norðragøtu og skifti navn til Leirkerið / Effzett, har Flóvin arbeiðir sum setari, umbrótari og týðari. Útgávuvirkið Leirkerið / Effzett eiga brøðurnir Flóvin Tyril og Zacharias Zachariasen saman. Flóvin er eisini sálmaskald, hann hevur yrkt og týtt nógvar andaligar sangir og sjálvur gjørt løg til einstakar sangir. Hann er góður við føroyska málið og er ein dugnaligur rættlesari. Flóvin er giftur við Sunnevu, f. Joensen, úr Vági. Børnini hjá teimum eru: Birna, Búi, Marni, Jón og Malan.

## Dagurin

8. apríl. Janus. Navnið er ókent í halgimannatali; sipar helst til ein Januaris í Suðuritaliu, sum varð tikin av døgum. Venscelaus Ulricus Hammersheimb deyður hendan dagin í 1909. Kristian Osvald Viderø deyður í 1991

## Winnie Trondesen 40 ár



Leygardagin 5. apríl fylti Winnie Trondesen í Havn 40 ár. Winnie er ættað úr Ísansgarði á Sandi og uppvaksin í Skálavík. Hon flutti til Havnar í 1983 og arbeiddi á Dagblaðnum frá 1984-92 og á Team 85 frá 1994-2000. Síðan 2000 hevur hon arbeitt á Hestprent og frá 1. janaur 2003 á Sosialinum, í samstarvi við Hestprent. Winnie er gift við Marna Andreasen úr Havn og eigur børnini Hera, Beintu og Teitur.

# Nøvn í vikuni

### Kennir tú onkran …



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:........................................................................................................
Bústaður:...................................................................................................
Bygd/býur:...........................................................Tel:...................................
Evt. arbeiðspláss:.......................................................................................

Merkisdagurin er: ........................................................................................

Innsendari: ...............................................................Tel:.............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 311820/216135, fax 314720, teldupost: maggi@sosialurin.fo
Norðoyggjar: tel. 458686, fax 458687, teldupost: solby@sosialurin.fo
Eysturoy: tel. 447820, fax 449520, teldupost: vilmund@sosialurin.fo
Suðuroy: tel. 375364, fax 375464, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 333820, fax 333720, teldupost: edvard@sosialurin.fo